# Ein matpakki smakkar eisini væl í Miðlahúsinum

**Hvat gert tú, tá børnini í fylginum bráðliga byrja at klaga um svongd?**

BÝARVITJAN
*Snorri Brend*

Tú ert júst komin oman í miðbýin í Havn, og børnini tykjast hugna sær. Og langt er niðan aftur í vøggustovuna. Hvat er so til ráða at taka?

Jú, starvsfólkini í Hvølpastovu í Stella Maris vistu ráðini – ella kanska var tað eitt av børnunum, sum kom við tí góða hugskotinum:

- Tá vit eru í býnum, hví ikki fara inn í Miðlahúsið í Vágsbotni at eta matpakkarnar? So fái eg eisini sagt hey við babba, sum arbeiðir á Sosisjalinum!

Sum sagt, so gjørt. Tey settust friðarliga við borðini, eftir at vera sloppin av við uttanduraklæðini, at eta matpakkar sínar. I dagens anledning fingu tey sodavatn afturvið.

Aftaná eina góða máltíð vantaði bert eitt, nevniliga myndatøkan. Tað høvdu hvørki børn ella starvsfólk nakað ímóti. Úrslitið av hesum sæst á hesi síðuni. Løtu seinni fóru tey út aftur í góðveðrið. Tey takkaðu fyri seg, og ynsktu okkum øllum ein góðan arbeiðsdag innanveggja.




*Tey hava etið ein góðan matpakka og fara nú víðari út í góðveðrið í høvuðsstaðnum*

Mynd: Jens Kr. Vang

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag :**
Fyrrapartin fleyr til gul av útsynningi, seinnapartin veksur hann vindin upp í stívt andøvsgul. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av vestri og útnyrðingi og regn ella mjørki av og á. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið Hvítusunnudag:**
Gul til stívt andøvsgul av norði og landnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.

**Veðrið 2. Hvítusunnudag og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul millum útnyrðing og landnyrðing og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 4 og 8 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 2 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 3 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 11 |
| Tromsø | 8 |
| Bergen | 8 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 14 |
| Keypmannah. | 11 |
| Helsinki | 13 |
| Moskva | 10 |
| Berlin | 6 |
| Warzawa | 13 |
| Kiev | 10 |
| Bukarest | 11 |
| Paris | 13 |
| Madrid | 25 |
| Róm | 21 |
| Malorca | 23 |
| Athen | -- |
| Malta | 25 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 23 |
| New Dehli | 36 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 20 |
| New York | 19 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 25 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 18 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1011 hPa. sunnan fyri Ísland fer suðureftir. Eitt hátrýst, 1027 hPa. yvir Norðsjónum fer í útnyrðing.




**Í dag:**
Hátrýstið í útsynning úr Føroyum fer vestureftir. Eitt brúgvalag norðan fyri Føroyar fer í landsynning og hevur kaldari luft og æling við sær.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 10/5 kl. 06[00]– 11/5. 06[00]. Hitin í gjár: 4,8°
Minsti hiti máldur í mai: -3,0° - Mesti hiti máldur í mai: 19,7°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,6 mm – mált frá 10/5 kl. 06[00]– 11/5 kl. 06[00]
Avfallið higartil í mai: 9,3 mm

I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

Sosialurin

## VESTFALLSKYRRINDI

8. mai Tendring
14. mai Mánin longst frá jørðini
16. mai Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 13. mai | 11.28 | 23.52 | 10.28 | 22.52 | 10.43 | 23.07 | 01.04 | 13.28 | 02.04 | 14.28 | 09.43 | 22.07 | 08.43 | 21.07 | 11.43 | - | 00.19 | 12.43 | 11.13 | 23.37 | 00.04 | 12.28 |
| 14. mai | - | 12.15 | 11.15 | 23.38 | 11.30 | 23.53 | 01.52 | 14.15 | 02.52 | 15.15 | 10.30 | 22.53 | 09.30 | 21.53 | 00.07 | 12.30 | 01.07 | 13.30 | - | 12.00 | 00.52 | 13.15 |
| 15. mai | 00.38 | 12.59 | 11.59 | - | - | 12.14 | 02.38 | 14.59 | 03.38 | 15.59 | 11.14 | 23.35 | 10.14 | 22.35 | 00.53 | 13.14 | 01.53 | 14.14 | 00.23 | 12.44 | 01.38 | 13.59 |
| 16. mai | 01.20 | 13.53 | 00.20 | 12.53 | 00.35 | 13.08 | 03.20 | 15.53 | 04.20 | 16.53 | - | 12.08 | 11.08 | 23.41 | 01.35 | 14.08 | 02.35 | 15.08 | 01.05 | 13.38 | 02.20 | 14.53 |
| 17. mai | 02.26 | 14.58 | 01.26 | 13.58 | 01.41 | 14.13 | 04.26 | 16.58 | 05.26 | 17.58 | 00.41 | 13.13 | - | 12.13 | 02.41 | 15.13 | 03.41 | 16.13 | 02.11 | 14.43 | 03.26 | 15.58 |

5 707265 100050 >